Fróðskaparsetur Føroya
University of the Faroe Islands

Søgu- og samfelagdeildin
Department of History and Social Sciences

# Skeiðupplýsingar

**Skeiðsnummar** 2449.18

**ECTS** 10.00

**Heiti** Mannarættindi, religión og politikkur

**Endamál**

At geva tí lesandi innlit í hugtøk og ástøði um altjóða mannarættindi og religión; at skilja samanspælið og spenningarnar ímillum mannarættindi og religión; at skilja spenningarnar ímillum hugtøk sum sekularisering og átrúnað, universalismu og relativismu, rættindi og skyldur, einstaklingin og samfelagið. Endamálið er at skilja upprunan til altjóða normar og hvussu normativar trúarskipanir sum t.d. átrúnaður hevur myndað nationalan og altjóða politikk. Tey lesandi skulu lýsa altjóða úrskurðir bæði rættsdogmatiskt og teoretiskt perspektiverandi.

**Innihald**

Øll menniskju hava nøkur grundleggjandi rættindi, sum skulu virðast og verjast uttan mun til politiskar, mentanarligar og átrúnaðarligar kringumstøður. Hetta var endamálið við ST-yvirlýsingini um universell mannarættindi, sum heimsins lond samtyktu í 1948. Men visjónin um at sameina heimsins mentanir og átrúnaðir um nøkur grundleggjandi virði hevur verið trupul at umseta til veruleika, og eftir 1948 hava lond og heimspartar samtykt síni egnu mannarættindi í samljóði við egna mentan, átrúnað og siðvenjur. Tí hvat er ein “mannarættur” í roynd og veru? Hvaðani stava idealini um t.d. trúarfrælsið, talufrælsið og javnstøðu? Er tað yvirhøvur gjørligt at seta í verk “universell” rættindi í einum multikulturellum og multireligiøsum heimi? Ella eru øll rættindi relativ í mun til tíð, stað og trúgv? Hetta tvørfakliga skeiðið kombinerar normativa politiska teori, filosofi, søgu og løgfrøði. Skeiðið viðger, hvussu altjóða normar verða til, og hvussu mótstríðandi normativar hugmyndir, m.a. átrúnaður, mynda bæði altjóða og nationalan politikk.

**Læru- og undirvísngarhættir**

Fyrilestrar hjá høvuðsundirvísara og gestaundirvísarum. Væntað verður aktiv luttøka frá næmingunum.

**Próvtøkuháttur**

Uttanseturs.
Munnlig próvtøka telur 2/3, meðan skrivlig heimauppgáva, sum er fortreyt fyri at sleppa til roynd, telur 1/3 av próvtalinum.
Heimauppgávan er ein allýsing og kritisk viðgerð av einum dómi frá Europeiska mannarættindadómstólinum, sum er viðkomandi fyri skeiðið. Dómurin skal vera minst 20 síður til longdar. Heimauppgávan skal vera minst 6 síður (18.375 tekn uttan millumrúm) og maks 8 síður (24.500 tekn uttan millumrúm) til longdar.

**Próvdøming** Uttanhýsis

**Próvtalastigi** 7-talsstigin

| | |
|---|---|
| **Lestrarlisti** | Umleið 700 síður. |
| **Fortreytir** | Bachelor prógv ella samsvarandi við nóg mikið av løgfrøði |
| **Læruúrtøka** | Tá skeiðið er liðugt, skal tann lesandi:<br><br>- Duga at greina grundleggjandi hugtøk viðvíkjandi mannarættindum, religión, sekularisering, universalismu og relativismu<br>- Duga at greina samanspælið og spenningarnar ímillum religión og mannarættindi<br>- Duga at nýta hesi hugtøk í greining av aktuellum mannarættindaspurningum, eitt nú í greining av ítøkiligum mannarættindaúrskurðum. |
| **Stig** | Master |
| **Ábyrgd** | Bárður Larsen, email: bardurl@setur.fo |

Fróðskaparsetur Føroya
University of the Faroe Islands

Søgu- og samfelagdeildin
Department of History and Social Sciences

# Course information

| | |
|---|---|
| **Course number** | 2449.18 |
| **ECTS** | 10.00 |
| **Title** | Human Rights, religion and politics |
| **Aim** | The student will gain knowledge about concepts and theories on human rights and religion; to understand the interaction and tensions between human rights and religion and to understand tensions between concepts such as secularization and religion, universalism and relativism, rights and duties, the individual and society. The purpose of the course is to examine the origins of international norms and how normative systems of ideas, such as religion, have shaped national and international politics. The students will also analyze international judgments from both a dogmatic as well as a theoretical perspective. |
| **Content** | All human beings have certain inalienable rights which should be respected and defended regardless of political, cultural and religious circumstances. This noble ambition was the very purpose of the Universal Declaration of Human Rights adopted by the UN in 1948. However, the vision of unifying the world around these values – and across different cultures and religions – has proven more than difficult. After 1948, many states and regional alliances have adopted their own versions of human rights according to their own cultural and religious particularities. The ongoing tensions between local particularities and global standards triggers certain key questions: What is a human right? What are the origins of values such as freedom of religion and freedom of expression? Is it possible to implement “universal” rights in a multicultural and multireligious world? Or are all rights relative vis-à-vis time, place and faith? This interdisciplinary course will combine normative political theory, philosophy, history and law. The course will examine how international norms emerge, how they travel across borders and how rivalling normative systems of belief, such as religion, shape national and international politics. |
| **Learning and teaching approaches** | The course will consist of lectures by main teacher and guest teachers. Active participation from student will be expected |
| **Assessment method** | External<br>Oral exam shall count for 2/3, and a written home assignment, which is a prerequisite for admission to the exam shall count for 1/3 of the mark. The home assignment consists of an analysis and critical discussion of a judgment from the European Court of Human Rights relevant to this course. The judgment must be at least 20 pages long. The home assignment must fill min. 6 pages (18,375 characters without spaces) and max. 8 pages (24,500 characters without spaces). |

| | |
|---|---|
| **Examination** | External |
| **Grading scale** | 7-step marking scale |
| **Literature** | Approximately 700 pages |
| **Prerequisites** | Bachelor degree or equivalent with adequate component of law |
| **Learning outcomes** | When the course is over, students are required to:<br><br>- Analyze basic concepts on human rights, religion, secularization, universalism and relativism<br>- Analyze the interaction and tensions between religion and human rights<br>- Apply these concepts when analyzing concrete and contemporary human rights issues, fx in the analysis of concrete human rights judgments. |
| **Level** | Master |
| **Contact** | Bárður Larsen, email: bardurl@setur.fo |